ÍF-KÌF 3-0 (25-12,25-15,25-19)

So kom gullið í hús

Tað gjørdist ikki neyðugt hjá ÍF at finna meistaraspæl fram fyri at vinna á KÌF leygardagin, og harvið var fyrsta meistaraheitið hjá kvinnunum veruleiki

FLOGBÒLTUR
Orð:Heri á Rógvi
Myndir: Finnur Justinussen

Fyri fyrstu ferð kann ÍF kalla seg føroyameistari í bestu kvinnudeildini í flogbólti.

Tað vóru valla ikki nógv, sum roknaðu við, at KÌF fór at gera stórvegis við ÍF á síðsta leikdegi í meistaradeildini hjá kvinnum. Fyri spenningin skuldi allir dystirnir spælast samstundis, men dysturin á Kambsdali leygardagin gjørdist ongantíð spennandi fyri nakran annan enn ÍF-áskoðararnar, ið kundu hátíðarhalda eitt meistaraheiti afturat leygardagin við realiseringini av meistaraheitinum hjá monnum.

Eitt lið við kós móti FM-heitinum á síðsta leikdegi eigur at klára uppgávuna – at vinna á botnliðinum, og í so máta gjørdi ÍF sína skyldu.

KÌF stríddist væl allan dystin, men í tí stóra og heila eru ÍF bara eitt sindur betri í flestu þørtum av spælinum. Liðið hevði ein ógvuliga lítið sannlíkan møguleika at sleppa sær undan at spæla um upp- og niðurflyting, men kravið var so, at dysturin skuldi vinnast 3-0, og tað var skjótt greitt fyri øllum, at soleiðis skuldi tað ikki vera leygardagin.

Karmarnir rundanum dystin vóru nakað av besta, føroyskur flogbóltur og Fuglafjørður hevur at bjóða. Ítróttaligi stoltleikin í bygdini er flogbólturin, og fuglfirðingar í stórum tali og í góðum hýri vóru farnir av húsum leygardagin at stuðla besta kvinnuliðinum hjá felagnum.

So slap endiliga at vinna okkurt. Randi Larsen hevur biðað leingi eftir meistaraheitinum, men leygardagin var biðitið ikki nakað, tosað var um.

Byrjanin

Longu undan dystinum fingu mongu áskoðararnir skapt ein stemning. Høllin á Kambsdali livdi, og fyri mongu stuðlarnar var eingin ivi um, hvar gullið fór leygardagin.

Undir upphitingini varð fasti hevarin hjá KÌF, Angilie Johannesen, send til teljingar, eftir eitt hendiligt óhapp, og hon var tí ikki við frá byrjan. At byrja við tóktist skaðin at vera álvarssamur, men tíðbetur kom Angilie skjótt aftur á vøllin.

KÍF hevði undan dystinum fingið styrkt sær liðið. Millum annað fyrrverandi TB-leikarin, Winnie Djurhuus, var við á KÌF liðnum, ið nakrar dystir hetta kappingarárið hevur havt eitt sindur trupult við at fylla útskiftaraplássini.

Byrjanin gjørdist – sum roknast kann við - heldur meira merkt av nervum og mistøkum enn nøkrum øðrum. Liðini fylgdust hampuliga væl uttan tað nógva góða flogbóltsspælið eina løtu, men ÍF byrjaði skjótt at hála frá.

ÍF kom á odda 12-5, 18-8, 21-9,23-11 og tær vunni til síðst settið við úrslitinum 25-12.

Serliga álopssøælið hjá ÌF lá bæði í støði og hædd væl omanfyri tí hjá kollfirðingum.

Meira javnt

Í fyrsta settið gjørdi KÌF fleiri útskiftingar, men tað kom ongantíð tann neyðuga róin yvir spælið. Innskiftið hevarin spældi seg ikki rættiliga heita í fyrsta settið, men tað gekk betri í øðrum setti.

Spælið hjá KÌF var munandi betri enn í fyrsta settið, og tær megnaðu at halda mistøkunum burtur. Greitt er, at skal KÌF gera nakað móti ÍF – uttan tað nógvu styrkina í álopspartinum – mugu mistøkini vera so fá sum gjørligt, og støðið á gólvspælinum má hækkast munandi.

Liðini fylgdust hampuliga væl, og KÌF megnaðu sum sagt at halda tørn, og tær vístu, at tær hava potentialið at gera meira við ÍF. Støðan var 7-7 og 9-8 til ÍF, men so fóru tær reyðu leypandi avstað. Støðan gjørdist 16-12,20-12 og settið endaði við úrslitininum 25-15 til ÍF.

KÌF hevði í øðrum settið ikki nógv annað at spæla fyri enn æruna, og tær stríddust nógv allan dystin á tamb, men kundi ikki rættiliga hótta ÍF í øðrum settið.

Kanski besta flogbóltsleikarin hjá kvinnum í ár, Nikolina Alner, sum saman við Marija Ninkov hevur styrkt munandi um ÍF liðið, byrjaði eisini at folda seg út í øðrum setti.

Hon fekk fleiri hevingar á miðjuni, tá ÍF valdi at skifta heilt fitt út, soleiðis at allir leikarar sluppu at royna seg á síðsta leikdegi.

Hennarar frálíka góðu sløg vistu KÌF einki ráð fyri at standa ímóti tað mesta av settinum, og kundi uttan iva spælt ein enn størri leiklut í dystinum, um ikki KÌF seinni í dystinum fann stevið.

Gull og tó

Í einum flogbóltsdysti tørvar tær bert at vinna trý sett, og nú vóru tvey avgreidd, og komandi meistararnir skuldu bara avgreiða hesa síðstu løtu. Tað hildu í øllum førum tey flestu.

Steypið og gullkrónurnar vórðu pakkaðar út, og tað hevur mestur verið hetta, ÍF kvinnurnar hava havt eyguni eftir, heldur enn spælinum, tí tað var einki at reypa av hjá ÍF.

Sum nevnt skuldu allir leikarar á vøllin, og hetta brýtur eitt sindur rútmuna, men kortini hevur tað mestu verið vantandi konsentratión og stríðsviljin hinumegin netið, ið gera, at rættiligur spenningur kemur í dystin.

Eftir at ÍF hava liðið langt frammanfyri berja KÌF seg fram á ÍF, og støðan gjørdist 17-17. Hetta var ov nógv av tí góða, og ÌF venjarin noyddist fyri fyrstu ferð at biðja sínar leikarar koma í samráð í einum time-out.

Og ÌF kvinnurnar fóru eisini frá KÌF aftur, og settið - og harvi meistaraheitið - var vunnið við muninum 25-19. Men eina løtu vóru KÌF kvinnurnar væl við, men munurin var kortini sjónligur.

Vit skulu ikki gera dystin til meira enn hann var. Talan var um topp og botn, og munurin var eisini stórur á liðunum. ÍF er besta kvinnuliðið í føroyskum flogbólti í løtuni, og tær hava stríðst fram til eitt meistaraheitið á fyrsta sinni.

Fremsta styrkin hjá ÍF eru tær báðar framúr góðu útlendsku, men liðið hevur fleiri streingir at spæla upp á enn tær vístu í eitt nú steypafinaluni, og ÍF er gott dømi um, hvønn positivan virkning útlendskir leikarar hava fyri kappingini, og hvussu nógv tvær øgiliga góðir leikarar kunnu gera.

KÌF noyðist at spæla upp- og niðurflytingardystir móti SÌ. Møguleikin skuldi vera til staðar at varðveita plássið, og eitt ella annað stað liggur eitt ávíst potentiali í KÌF kvinnunum.

Leikararnir eru ungir, og kunnu tær fáa loyvi at menna seg meira, so kann okkurt spennandi spyrjast burturúr um nøkur. Hinvegin er tað sum er ilt at síggja, at liðið skal blanda seg í nakað oddastríð komandi árini uttan hjálp úr fremmandum londum.

Staðfestast kann, at ÍF leikárið 2002-2003 er besta føroyska flogbóltsliðið hjá monnum, men so sanniliga eisini hjá kvinnum.

Sosialurin ynskir ÌF til lukku við føroyameistaraheitinum.

Nikolina Alner er mest sannlíkt eitt gott boð upp á ársins leikarar hjá kvinnum, tá galla veitsla verður hildin. Aftur leygardagin vísti hon, at hon slær sum eingin annar í føroysku kappingini.

Endaliga støðan, meistaradeild, kvinnur

	d	v	-	t	sett	v sett	t sett	+/- stig
1 ÍF (GULL)	20	17	-	3	55	22	33	26
2 Mjølnir (SILVUR)	20	16	-	4	54	18	36	25
3 TB (BRONSU)	20	14	-	6	50	21	29	20
4 Dráttur	20	8	-	12	29	44	-15	11
5 Fleyr	20	3	-	17	14	53	-39	5
6 KÍF	20	2	-	18	11	55	-44	3

TB vann harumframt steypakappingina.

Ùtlendingar hava hækkað støðið

Sóley Philbrow og Rønn Eliasen eru sannførdar um, at útlendsku leikararnir hava hækkað støðið á føroyskum flogbólti munandi

FLOGBÒLTUR
Heri á Rógvi

Kappingarárið í ár í føroyskum flogbólti hevur verið nógv merkt av útlendskum leikarum og venjarum.

Tað er nøkur ár síðani, at byrjað var aftur við at fáa útlendskar spælarar og venjarar til Føroya.

Í áttatiárunum hevði Fleyr stóran fyrimun við at hava kinverskan venjara, men við kreppuárunum og trongu figgarligu korunum var lítið og einki at síggja til útlendingar í føroyskum flogbólti tað mesta av nítiárunum.

Hesi seinnu árini er vend komin í, og flest øll feløgini í bestu deildunum hava útlendskar leikarar ella venjarar.

Tær báðar Sóley Philbrow og Rønn Eliasen, sum eru millum stuðulsleikararnar á ÍF liðnum hjá kvinnum, eru ikki í iva um, at útlendsku leikararnir eru ein fongur fyri føroyskan flogbólt.

– Tað er eingin ivi um, at støðið er hækkað við útlendsku leikarunum. Leikararnir eru flest allir á høgum støði, og teir megna at hála støðið á hinum upp, siga tær báðar.

ÍF kvinnurnar hava havt tvær útlendskar á liðnum, og frá liðfeløgunum, Rønn og Sóley, fáa tær stóra rós.

Tær hava enn ikki vunnið sær tann nógva førleikan á føroyskum, men á vøllinum gongur alt upp á stás, og tær báðar fuglafjarðagenturnar fegnast um uppískoytið til stammuna á liðnum.

Kinverski venjarin hjá Fleyr á sinni, sum eisini vandi landsliðini, gjørdi ikki nógv annað enn at fáast við flogbólt, men hetta gongur ikki longur. Hóast góðu tíðirnar hava styrkt feløgini og vinnulívstuðlarnar hjá feløgunum, so hava leikararnir arbeiðið við síðuna av flogbóltinum, og flestu teirra tykjast at stórtrívast í Føroyum.

Lítið fæst at vita, hvussu liðini fara at síggja út komandi kappingarár, men talið av útlendingum verður neyvan minni enn í ár.

Eftir hvat skilst halda útlendingarnir í Fuglafirði fram at spæla við teimum reyðu, men eingin kann siga hetta fyri vist, og aðrastaðni, vit hava vent okkum, er svarið nakað tað saman, at greiða ikki er fingin á hesum enn.

– Hetta er ótrúligt

–Kappingin hevur ongantíð verið so spennandi sum í ár, søgdu tvær fegnar fuglafjarðadamur, tá greitt var, at fyrsta FM-heitið var komið í hús

PRÀT
Heri á Rógvi

Ein góð og stabil stamma og tveir frálíkir útlendskir leikarar.

Soleiðis ljóðar uppskriftin hjá Sóley Philbrow og Rønn Eliasen upp á at vinna eitt FM-heiti í flogbólti.

Fyri fyrstu ferð eru ÍF kvinnurnar vorðnar føroyameistarar hjá kvinnum, men hetta hevur ikki verið uttan strið.

– Vit hava gjørt sera nógv við venjingina í ár. Allar hava dúgliga vant tríggjar ferðir um vikuna, og vit lagt nógvu orku í dystir og venjingar, sigur Rønn Eliasen, sum spældi libero á ÌF liðnum leygardagin.

Saman við Sóley Philbrow telist hon sum ein av føroysku stuðulsleikarunum á besta kvinnuliðnum í Føroyum. Men tær eru báðar skjótar at ásanna, at stuðulin frá teimum báðum Ninu og Marija er gull verdur.

– Tær eru báðar ótrúliga góðar – mestsum eins góðar. Nina slær næstan sum ein maður, og hin er ein ógvuliga klókur leikari, sum stendur seg væl á øllum økjum, siga tær báðar, Sóley og Rønn.

Nú meistaraheitið er komið í hús eru tær fegnar um endiliga at kunna kalla seg føroyameistarar.

"Stamman" á liðnum hevur spælt saman í fýra ár, og undan hesum kappingarárinum hevur ligið "bert" megnað at spæla um bronsumerkini.

–Kappingin hevur ongantíð verið so spennandi sum í ár. Tað ger tað eisini enn stuttligari at vinna kappingina, siga tær báðar.

Afturat stammuni á liðnum eru fleiri yngri leikarar komnir afturat, sum koma ymsastaðni frá í Eysturoynni.

Leygardagin sluppu allir leikarar at royna seg, og tóktist sum um, at breiddin er í lagi.

Yngru leikararnir eru millum sekstan og nítjan ár, og tær koma af Toftum, úr Runavík og av Eiði til Fuglafjarðar at venja tríggjar ferðir um vikuna.

Liðið hevur eisini veteranar sum Randi Larsen, sum er vorðin 37 ára gomul, og Rønn Eliasen, sum eisini hevur drúgvar royndir sum flogbóltsspælari.

Og gleðin er ikki til at taka feil av hjá nýggju føroyameistarunum:

– Hetta er ótrúligt, siga tær báðar við ein munn.